# Føroya Listaskúli



Álit handað landsstýrismanninum í mentamálum

4. september 2001

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ........ 2
Inngangur ........ 3
Tilmæli ........ 4
Kapittul 1 - Endamál og skipan ........ 6
Tørvur ........ 6
Endamál ........ 7
Støði ........ 7
Skipan ........ 9
Starvsfólk á skúlanum ........ 10
Rakstur ........ 11
Niðurstøður ........ 13
Kapittul 2 - Innihaldið í undirvísingini ........ 14
Myndlist ........ 15
Tónlist ........ 17
Leiklist ........ 19
Tóvirki - eksperimenterandi tekstillist ........ 21
Margmiðlalist ........ 23
Listasøga ........ 25
Niðurstøður ........ 26
Kapittul 3 - Fyritreytir og karmar ........ 27
Førleikakrøv - undirvísarar ........ 27
Næmingatal ........ 28
Hølistørvur - undirvísingin ........ 29
Hølistørvur - umsiting ........ 31
Hølistørvur - køk/kantina/uppihaldsrúm ........ 31
Hølistørvur - bústaður hjá næmingunum ........ 32
Hølistørvur - bústaður hjá læraraum ........ 32
Niðurstøður ........ 33

# Inngangur

Tann 8. mai 2001 setti táverandi landsstýrismaður við mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, arbeiðsbólk at gera álit um ein listaháskúla á Sandi. Bólkurin var mannaður við seks limum, hvør teirra umboðandi eina av listabreytunum, ið ætlanin er at undirvísa í á listaskúlanum:

Guðrið Poulsen fyri myndlistina
Páll Danielsen fyri leiklistina
Kári Sverrisson fyri tónleikin
Lis Helgadóttir fyri tóvirki
Sam Jakobsen fyri margmiðlalistina

Jeanette E. Blåsvær, fulltrúi í Mentamálastýrinum, varð sett at vera formaður.

Arbeiðssetningurin, ið arbeiðsbólkurin skuldi gera álit um, var soljóðandi:

Arbeiðsbólkurin skal:

1. gera uppskot til skipan av skúlanum - sjálvsognarstovnur ella annað
2. gera uppskot til innihaldið í undirvísingin á skúlanum
3. lýsa førleikakrøv, ið lærarar á skúlanum eiga at hava
4. gera fíggjarætlan fyri rakstur á skúlanum
5. gera uppskot til hølistørv - undirvísing, verkstøð, bústað, køk og kantinu, skrivstovu o.s.fr.
6. kanna um neyðugt lógargrundarlag er í verandi lóggávu, at seta skúlan á stovn, ella gera uppskot til hvørjar ásetingar ein nýggj lóg fyri listaskúlan eigur at innihalda
7. lýsa stuðulsmøguleikarnar hjá næmingunum og møguliga gera uppskot til broytingar í verandi stuðulsskipan.

Ásett varð, at arbeiðsbólkurin skuldi handa landsstýrismanninum álitið tann 2. juli 2001.

Arbeiðsbólkurin hevur havt 7 fundir, og hvør limur hevur skrivað tilfar um endamál, innihald, førleikar hjá lærarunum, hølistørv o.s.fr. Hetta tilfar er samanskrivað í hesum áliti.

Arbeiðsbólkurin fekk sostatt góðar tveir mánaðar at arbeiða við arbeiðssetninginum. Hetta vísti seg skjótt at verða ov stutt tíð. Hóast arbeiðsbólkurin hevur havt regluligar fundir, bar ikki til at gera arbeiðið liðugt til ásettu tíð. Samstundis kom summarfrítíðin ímillum, og lá arbeiðið tá stilt umleið ein mánað.

# Tilmæli

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum er, at tørvur er á einum listaskúla í Føroyum.

Endamálið við listaskúlanum er at menna listarligu evnini hjá næminginum og stimbra næmingin soleiðis, at hann eftir lokið skúlauppihald hevur fingið eitt grundstøði innan valdu listabreytina. Undirvísingin fer fram innan skapandi evni, innan ávikavist myndlist, tónlist, leiklist, tóvirki og margmiðlalist, og verður innihaldið í undirvísingini bæði praktiskt og ástøðiligt. Næmingurin á listaskúlanum eigur at tilogna sær ein førleika innan valdu listagreinina, ið hann kann nýta, um hann t.d. ætlar sær á lærdan listaháskúla.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at listaskúlin verður skipaður sum ein sjálvsognarstovnur, ið er óheftur av politisku skipanini. Samstundis mælir arbeiðsbólkurin til, at raksturin verður fíggjaður við stuðli úr landskassanum og einum ávísum luttøkugjaldi. Ongar heimildir eru í galdandi lóggáva at veita Føroya Listaskúla studning úr landskassanum, og verður tí mælt til, at nýggj lóggáva verður gjørd við støði í hesum áliti. Samstundis er arbeiðsbólkurin komin til ta niðurstøðu, at næmingar á listaskúlanum eiga at fáa lestrarstuðul í lestrartíðini, men verandi lóggáva fyri útbúgvingarstuðul heimilar ikki hesum. Mælt verður til, at henda lóggáva verður broytt, soleiðis at tað er møguligt at lata stuðul til næmingarnar í skúlatíðini.

Listaskúlin eigur at skipast sum ein vistarskúli. Harvið verður ein felagskapur millum næmingar og lærarar í tíðini, skeiðið fevnir um. Arbeiðsbólkurin metir, at Listaskúlin eigur at kunna hýsa umleið 40 næmingum, umframt at nakrir lærarar eiga at búgva á skúlanum. Arbeiðsbólkurin hevur lýst hølistørvin, bæði tá tað kemur til undirvísing, bústað hjá næmingum og lærarum, umsiting og uppihald hjá teimum, sum búgva á skúlanum. Arbeiðsbólkurin hevur eisini lýst, hvørji amboð eru neyðug innan hvørja listabreyt.

Tað er politiskt avgjørt, at listaskúlin skal vera heima á Sandi á Sandoy. Tí hevur arbeiðsbólkurin ikki tikið støðu til, hvar skúlin eigur at liggja. Arbeiðsbólkurin metir tó, at skúlin eigur at vera á einum staði, har tað er lætt at koma til miðstaðarøkið, tí tað er her framsýningar og framførslur eru í størsta mun. Arbeiðsbólkurin heldur samstundis, at tað kann vera positivt, at skúlin verður í einum friðarligum umhvørvi, soleiðis at ein sosialur felagsskapur verður skapaður millum næmingar og lærarar í tíðini, skeiðið fer fram.

Mælt verður til, at dentur verður lagdur á at seta dygdina í hásæti, soleiðis at skúlin verður eitt veruligt tilboð til ungfólk, sum hava skapandi gávur og umhugsa at fara á lærdar listaháskúlar at nema sær útbúgving.

Lærararnir eru tann týdningarmesti parturin av skúlanum, tí tað eru lærararnir, ið fara at mynda innihaldið á skúlanum, og sum fara at geva skúlanum sítt umdømi. Ein annar týdningarmikil partur av skúlanum eru karmarnir annars á skúlanum, tí umstøðurnar eru amboðini hjá næmingunum til veruliga at útinna tað, tey hava hug til og megna, ímeðan tey eru á skúlanum. Skal listaskúlin gerast til eitt veruligt tilboð, heldur arbeiðs bólkurin, at tað er alneyðugt, at hædd verður tikið fyri hesum, tá rakstraræltlanin fyri skúlan verður gjørd.

Arbeiðsbólkurin heldur, at undirvísararnir skulu vera sera væl fyri, bæði fakliga og pedagogiskt. Í teimum skapandi lærugreinunum skulu skapandi listafólk undirvísa.

Mentamálastýrið tann 4. september 2001

Jeanette Ellefsen Blåsvær
*formaður*

Guðrið Poulsen

Páll Danielsen

Kári Sverrisson

Lis Helgadóttir

Sam Jakobsen

# Kapittul 1 - Endamál og skipan

*Í hesum kapitlinum verður sjálvt grundarlagið fyri listaskúlanum viðgjørt. Hvat er Føroya Listaskúli, er tørvur á einum slíkum skúla, hvat er endamálið, og hvørjum støði er frálæran á? Eisini verður umrøtt, hvønn bygnað og hvørja skipan skúlin eigur at hava. At enda hevur arbeiðsbólkurin sett fram eina rakstarætlan fyri skúlan.*

## Tørvur

Sambært nýggju fólkaskúlalógini, skal næmingurin í fólkaskúlanum umframt at fáa undirvísing í teimum bókligu lærugreinunum, eisini menna síni skapandi evni innan list og handverk.

Eftir lokið fólkaskúlaprógv hava næmingarnir fleiri møguleikar at fara undir víðari útbúgving, t.d. við at fara á vinnu- ella miðnámsskúla, fara í læru og fara á tekniskar skúlar. Hesi tilboðini til næmingarnar eru grundað á tær bókligu lærugreinarnar, meðan so at siga einki veruligt tilboð er í Føroyum til næmingar, ið hava hug at menna síni skapandi og listarligu evni.

Teir næmingar, sum í dag hava tørv á undirvísing innan skapandi evni, eru noydd at leita sær til útlondini. Hetta kann vera ein fyrimunur, um so er, at viðkomandi hevur ein útlongsul og vil royna nakað nýtt í nýggjum umhvørvi. Hevur viðkomandi hinvegin ikki henda útlongsul, men kortini vil royna síni skapandi evni - og kanska eisini vil nýta tað, sum er sermerkt innan okkara mentan, náttúru, søgu og samfelag - er hetta ikki ein møguleiki í dag.

Hetta er ein stórur vansi í einum hvørjum samfelag, tí tað merkir, at ungdómur antin setist aftur, ella verður noyddur at flyta ímóti sínum hugi og vilja. Hetta hevur samstundis við sær, at vit ikki troyta teir møguleikar, sum eru her á landi, tí vit geva ikki rúm og møguleika fyri at eksperimentera og skapa burtur úr tí, sum vit kenna.

Við støði í hesum metir arbeiðsbólkurin, at stórur tørvur er á einum listaskúla í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin metir, at Listaskúlin skal virka bæði sum lopfjøl til framtíðar virksemi hjá næminginum, t.d. í sambandi við at næmingurin ætlar sær undir víðari lesnað á lærdum listaháskúla, og sum eitt ógloymandi skúlauppihald, sum í sær sjálvum nøktar tørvin hjá tí einstaka næminginum.

## Endamál

Endamálið við listaskúlanum er at menna listarligu evnini hjá næminginum og stimbra næmingin soleiðis, at hann eftir lokið skúlauppihald hevur fingið eitt grundstøði innan valdu listabreytina.

Á einum listaskúla fer undirvísing fram innan skapandi evni, sum gevur næminginum førleika, sum hann kann nýta, um hann t.d. ætlar sær undir víðari lestur innan list, ella um hann hevur tørv á íblástri.

Næmingurin skal á skúlanum fáa íblástur til at leita inn í seg sjálvan, at finna síni skapandi evni og menna hesi við egnum hugflogi. Umframt at læra handverkið innan valdu listabreytina, skal næmingurin læra at greina og venja síni evni til sjálvstøðuga meting og støðutakan.

Listaskúlin skal vera karmur um eitt nýskapandi og eksperimenterandi skúlaumhvørvi, og skal samsvara við samtíðar krøv og tørv. Listaskúlin skal geva rúm fyri hugflogi, fyri persónligari menning og íblástur til heildarmeting. Á listaskúlanum skal næmingurin menna sín egna serstaka hátt at seta dám á tað, ið skapað verður.

Listaskúlin eigur at taka støði í føroysku listaverðini og leggja dent á tað serføroyska og nýta hetta til at skapa nýtt burturúr. Á skúlanum skal næmingurin tilogna sær vitan um føroyska og alheims listasøgu.

Undirvísingin skal fara fram á føroyskum, tó eigur at verða gjørligt hjá norðurlendingum og øðrum at ganga á skúlanum. Skúlaleiðslan tekur støðu til hetta, soleiðis at býtið av næmingum er hóskandi.

Skúlin bjóðar undirvísing og lærarar, hentleikar, skeiðsætlanir, mat og bústað, ímeðan næmingurin hevur ábyrgd av og er við til at skapa eina fakliga, persónliga og sosiala lærutilgongd.

## Støði

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvørjum støði skúlin skal vera á. Skal hann vera fyri øll, ella skal hann vera fyri tey, ið hava serligar listarligar gávur?

Arbeiðsbólkurin heldur, at Listaskúlin eigur at vera fyri tey, sum vilja menna síni skapandi evni. Áðrenn næmingurin kemur á Listaskúlan, eigur hann at hava nakað av førleikum ella viðkomandi royndum innan ta listabreyt, hann velur á listaskúlanum. Fyri at velja út, hvør skal sleppa inn á skúlan, eigur ein upptøkusamrøða at vera við næmingin. Upptøkukrøv eiga annars ikki at vera. Torført er at siga neyvt, hvussu gamlir næmingarnir skulu vera. Upptøkusamrøðan kann tó nýtast sum

amboð at meta um, hvussu búgvin næmingurin er, og hví hann søkir inn á skúlan. Endamálið við samrøðuni er at seta saman ein góðan og vælvirkandi flokk innan hvørja breyt.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt spurningin, hvørt skúlin skal vera ein háskúli ella ikki. Arbeiðsbólkurin metir, at tað liggur eitt tvíbýti í orðinum "háskúli". Tað hevur bæði týdning sum ein grundtvigianskur fólkaháskúli, har dentur verður lagdur á at menna persónliga sjálvsfatan og medvit, heldur enn tað fakliga innihaldið, og harumframt nýta vit í Føroyum orðið "lærdur háskúli" um universitet o.l. hægri útbúgvingar. Arbeiðsbólkurin fer tí at mæla frá at kalla skúlan listaháskúla, men ístaðin nevna hann Føroya Listaskúli.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er neyðugt - skulu næmingarnir fáa fulla ágóða av skúlaárinum - at skúlin verður skipaður sum ein vistarskúli, har næmingarnir búgva á skúlanum í skúlatíðini. Harvið kunnu næmingarnir fordjúpa seg í undirvísingini og arbeiða við listagreinini bæði í skúlatíðini og aftaná at formliga undirvísingin er av. Samstundis verður ein sosialur felagsskapur millum næmingarnar og millum næmingar og lærarar í tíðini, tey eru á skúlanum.

Aftaná at formliga undirvísingin er av, eiga sosial tiltøk at vera á skránni eftir áhuga; t.d. kroppur og rørsla, kórsangur, fyrilestrar, kvøldsetur, tónleikaframførslur o.s.fr. Í tíðarskeiðinum næmingarnir eru á skúlanum, eigur eisini at vera farið á vitjanir/útferðir innanlands og á námsferð uttanlands.

Fyri at tryggja eitt mennandi sosialt umhvørvi eiga í minsta lagi 3-4 lærarar at búgva á ella nærhendis skúlanum.

Árið á listaskúlanum kann t.d. nýtast sum grundstøði, um næmingurin ætlar sær á víðari lesnað á einum lærdum listaháskúla, uttan at skúlin er beinleiðis førleikagevandi. Hugsanin aftanfyri hetta er, at tað er læringin, sum hevur týdning. Tað verður tí væntað av næminginum, at hann er íðin og luttekur virkin í undirvísingini. Fráfaringarprógv verður ikki latið, tí lærdir listaháskúlar krevja ikki prógv, fyri at næmingarnir skulu sleppa inn. Tá er tað bert tað, ið næmingurin kann vísa á, at hann dugir, sum hevur týdning.

Listaskúlin er sostatt ein grundskúli fyri øll, ið hava ein brennandi áhuga fyri at menna síni listarligu evnir, og har lívsmót og frísinni er í miðdeplinum.

## Aðrir háskúlar

Vit hava ein háskúla í Føroyum - Føroya Fólkaháskúli - ið hevur virkað í meira enn 100 ár. Hesin skúlin hevur allar royndir, tá ið tað kemur til skipan av skúla har næmingar búgva; køk, kantinu, vaktarskipan, lærarar, sum búgva á skúlanum, gestalærarar.

Øll henda vitan eigur at vera havd í huga, tá Listaskúlin verður settur á stovn.

Vit hava eisini ein Handarbeiðsskúla í Føroyum. Ætlanin er ikki, at tað, sum verður undirvíst á tóvirksibreytini á listaskúlanum verður tað sama, sum verður sum á Handarbeiðsskúlanum. Tóvirkisbreytin fer at verða meira eksperiementerandi og nýskapandi, og neyðugt er ikki, at tað sum skapað verður, skal verða eitt liðugt klædnaplagg og beinleiðis kunna nýtast. Arbeiðsbólkurin metir sostatt, at tað eru aðrir lutir, sum dentur verður lagdur á í innihaldinum á tóvirkisbreytini, enn tað, sum verður undirvíst á Handarbeiðsskúlanum.

Arbeiðsbólkurin metir, at Listaskúlin á Sandi skal ikki koma ístaðin fyri virkandi háskúlar, men harafturímóti bjóða aðrar lærugreinir enn tær, ið eru á verandi háskúlum.

# Skipan

Fyri at tryggja at skúlin er frælsur og óheftur av politisku skipanini verður mælt til, at skúlin verður skipaður við einum stýri, sum er ovasta leiðsla listaskúlans. Mælt verður til, at stýrið er samansett av 4 limum, har LISA tilnevnir tveir, Sands Bygdaráð ein og Mentamálastýrið ein, ið eisini er formaður. Skúlaleiðarin eigur at vera skrivari uttan atkvøðurætt. Harumframt eigur eitt lærarumboð og eitt næmingaumboð at vera í stýrinum uttan atkvøðurætt.

Stýrið setir listaskúlaleiðaran, sum er leiðari fyri dagliga virkseminum á skúlanum. Listaskúlaleiðarin hevur listarligu ábyrgdina fyri skúlavirkseminum, samstundis sum hann hevur nakað av undirvísingarskyldu. Afturat sær hevur skúlastjórin ein umsitingarleiðara, sum hevur ábyrgdina av tí umsitingarliga, her undir tað fíggjarliga.

Sambært galdandi reglur fyri skúlar, sum skipanarliga kunnu sammetast við listaskúlan, verður studningur úr landskassanum latin soleiðis:

- Til lønina hjá skúlaleiðaranum verða latin 100%.
- Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til lærararalønir og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr. verður latið 70% av kostnaðinum.
- Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til skúlan verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttafrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.
- Til keyp av innbúgvi og undirvísingaramboðum eftir landsstýrismansins góðkenning verður latin í mesta lagi 50% av kostnaðinum í stuðli.
- Næmingagjaldið verður ásett av stýrinum. Landsstýrismaðurin kann lata stuðul til hvønn næming eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur í samráð við skúlastýrið.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at verandi lóggáva kann nýtast í sambandi við, at Føroya Listaskúli verður settur á stovn, og eigur tí nýggj lóg at gerast sum samsvarar við tilmælini í hesum áliti. Mælt verður til, at lógirnar um eftirskúlar, fólkaháskúlar og húsarhaldsskúlar verða nýtt sum grundarlag.

## Starvsfólk á skúlanum

Torført er at meta ítøkiliga um, hvussu nógvum lærarum tørvur er á - her veldst um førleikarnar hjá einstøku lærarunum. Verður hugt eftir greinunum, undirvíst verður í, verður mett, at tørvur í minsta lagi er á einum lærara til hvørja breyt.

Lærarin skal hava ábyrgdina av innihaldinum og frálæruni á listabreytini, skal gera skeiðsætlan og tryggja at støðið er í lagi. Fyri at tryggja at undirvísingin er breið, eigur skúlin eisini at nýta gestalærarar.

Eitt uppskot er til dømis, at ein lærari fyri hvørja breyt verður settur í fult starv, og hevur hesin ábyrgdina av allari undirvísingini á breytini, heruppií at leggja undirvísingarætlan, finna røttu gestalærararnar og virka sum vegleiðari hjá næmingunum, t.d. um teir ætla sær undir víðari lesnað. Hesin skal hava ta listarligu ábyrgdina innan teirra listabreyt, og leggja ta listarligu undirvísingarrásina í samstarvi við skúlaleiðaran. Av starvstíðini hjá hesum læraranum, verður ½ tíð nýtt til undirvísing og hin helvtin til hinar lutirnar, sum nevndir eru omanfyri. Umframt hetta verða skiftandi gestalærarar undirvísarar á listabreytini, til samans eitt hálvt ársverk.

Neyðugt verður eisini at seta ein húsavørð, ið er handverkari, tí tað á skúlanum verður arbeitt við nógvum og ymsum tilfari. Neyðugt er at hava ein handverkara á staðnum í sambandi við framførslum o.l., og kann húsavørðurin eisini standa fyri hesum arbeiðið. Húsavørðurin eigur eisini at umsita høli, innkeyp og allar goymslur.

Á skúlanum verður køkur, sum skal gera mat til lærarar og næmingar tríggjar ferð um dagin - ábit, morgunmat og døgurða. Til hetta er neyðugt við tveimum starvsfólkum. Møguliga ber til at fáa skipan, har næmingarnir luttaka í matgerðini, men neyðugt verður tó við starvsfólki, ið hava leiðsluna av hesum.

## Rakstur

Sambært omanfyri standandi verður raksturin av skúlanum fíggjaður við stuðli úr landskassanum (70%), undantikið skúlaleiðaralønina, sum verður fíggjað 100% við stuðli úr landskassanum. Harumframt kann landsstýrismaðurin lata kr. 2.400 pr. næming um mánaðin. Vanligt er eisini, at næmingar á tílíkum skúlum, rinda eitt luttakaragjald. Ein annar møguleiki fyri inntøkum til raksturin á skúlanum er, at kommunan á staðnum kann lata stuðul til listaskúlan, soleiðis at luttøkugjaldið hjá næmingunum verður so lítið sum gjørligt. Niðanfyri standandi er eitt roknstykki, sum tekur útgangsstøði í rakstarútreiðslunum á Føroya Fólkaháskúla.

Fyribils fíggjarætlan:

| *Útreiðslur* | | % stuðul úr lands-kassanum | Árligur rakstur | Parturin sum landskassin fíggjar | Parturin sum verður fíggjað á annan hátt |
|---|---|---|---|---|---|
| Skúlaleiðarin | | 100% | 350.000 | 350.000 | 0 |
| Umsitingarleiðari | | 70% | 250.000 | 175.000 | 75.000 |
| Læraraútreiðslur - fastir lærarar | | 70% | 1.500.000 | 1.050.000 | 450.000 |
| Gestalærarar | | 70% | 750.000 | 525.000 | 225.000 |
| Húsavørður | | 70% | 225.000 | 157.500 | 67.500 |
| Køkstænarar | | 70% | 210.000 | 147.000 | 63.000 |
| Reingerðingsfólk | | 70% | 150.000 | 105.000 | 45.000 |
| **Lønarútreiðlsur** | | | **3.435.000** | **2.509.500** | **925.500** |
| | | | | | |
| Hiti og el | | 70% | 200.000 | 140.000 | 60.000 |
| Undirvísingartilfar | | 70% | 500.000 | 350.000 | 150.000 |
| Skrivstovuhald | | 70% | 100.000 | 70.000 | 30.000 |
| Undirvísingarmiðlar/innbúgv | | 50% | 300.000 | 150.000 | 150.000 |
| Køksútreiðslur | | 0% | 400.000 | 0 | 400.000 |
| Til námsferðir | | 0% | 200.000 | 0 | 200.000 |
| Annað | Tryggingar, ferðing, umvælingar | 70% | 500.000 | 350.000 | 150.000 |
| **Til samans** | | | **5.635.000** | **3.569.500** | **2.065.500** |
| | | | | | |
| *Inntøkur* | | pr. næming | | | 40 næmingar |
| Luttøkugjald pr. næming | undirvísing, kost og bústað | 11.488 | | | 459.500 |
| | til námsferð, tilfar o.a. | 5.000 | | | 200.000 |
| **Luttøkugjald** | | **16.488** | | | **659.500** |
| | | | | | |
| Landskassin 100% - skúlaleiðaralønin | | | 350.000 | | |
| Landskassin /rakstur | | | 3.569.500 | | |
| Næmingastuðul /landskassin | 2.400 pr. næming um mánaðin (11 mánaðar) | | 1.056.000 | | |
| **Landskassaútreiðslur til samans** | | | **4.975.500** | | |
| | | | | | |
| **Landskassin + luttøkugjald** | | | **5.635.000** | | |

## Stuðulsmøguleikar

Eftir hesari útrokning kostar eitt ársskeið á skúlanum um 16.000 kr. fyri hvønn næming. Umframt skúlakostnaðin skal næmingurin hava pening til at liva fyri í tíðarskeiðnum, hann er á skúlanum, tí eftir galdandi reglum fyri útbúgvingarstuðul, verður stuðul ikki latin til tílíkar útbúgvingar, tí tær ikki eru førleikagevandi. At kostnaðurin fyri eitt uppihald á listaskúlanum er so høgur, verður mett at verða ein stórur vansi og ein forðing, tá ungfólk í hesum aldrinum skulu velja, hvat tey skulu. Mælt verður tí til, at reglurnar fyri lestrastuðul verða broyttar soleiðis, at næmingar á listaskúlanum kunnu fáa útbúgvingarstuðul í lestrartíðini.

## Niðurstøður

Arbeiðsbólkurin hevur staðfest, at tað er tørvur á einum listaskúla í Føroyum, bæði tí at tað t.d. í nýggju fólkaskúlalógini er staðfest, at fólkaskúlanæmingar umframt at fáa frálæru í teimum bókligu greinunum, skulu menna síni skapandi evni innan list og handverk, og tí tað í Føroyum einki tilboð er til næmingar, sum ynskja at fáast við list burturav.

Endamálið við skúlanum er menna tey listarligu evnini hjá næmingunum og at stimbra næmingarnar til sjálvstøðuga meting og støðutakan innan tey skapandi fakini. Listaskúlin, sum skal vera ein 1 ára útbúgving, skal geva næmingunum eitt grundstøði innan listarligu greinirnar, sum m.a. kann nýtast, um næmingarnir ætla sær undir víðari lesnað á lærdum listaháskúla.

Listaskúlin eigur at skipast sum ein vistarskúli. Harvið verður ein felagskapur millum næmingar og lærarar í tíðini, skeiðið fevnir um.

Mælt verður til, at skúlin verður skipaður sum ein sjálvsognarstovnur, sum er óheftur av politisku skipanini. Listaskúlin verður fíggjaður við stuðli úr landskassanum og einum ávísum luttøkugjaldi, sum arbeiðsbólkurin mælir til ikki verður ov høgt. Samstundis mælir arbeiðsbólkurin til, at næmingarnir fáa lestrarstuðul í lestrartíðini.

Neyðugt er at gera nýggja lóggávu fyri at seta skúlan á stovn. Lóggávan skal verða grundað á tilmælini í hesum áliti. Eisini er neyðugt at broyta lógina um útbúgvingastuðul, soleiðis at næmingar á listaskúlanum kunnu fáa lestrastuðul.

# Kapittul 2 - Innihaldið í undirvísingini

*Arbeiðsbólkurin hevur tikið útgangsstøði í tilfarinum, ið Mentamálastýrið útflýggjaði í sambandi við, at arbeiðsbólkurin varð settur, t.e. at tað á Føroyska Listaskúlanum verður undirvíst í fimm breytum:*

- *myndlist*
- *tónlist*
- *leiklist*
- *tóvirki*
- *margmiðlalist*

*Í hesum kapitlinum verður farið ígjøgnum teir lutir, sum limirnir í arbeiðsbólkinum meta vera av týdningi, tá tað snýr seg um innihaldið í undirvísingini, fyritreytir fyri einum góðum úrsliti og hvussu undirvísingin kann vera skipað og annað, ið ger eitt uppihald á listaskúlanum inspirerandi og lærandi.*

## Myndlist

Listaskúlin á Sandi skal kappast við aðrar vælútbúnar listaskúlar í grannalondum okkara, tí eiga tilboðini á Føroya Listaskúla at vera á hægsta støði. Tað verður tí í hesum áliti skotið upp, at myndlistabreytin í fyrsta umfari avmarkar seg til at umfata málningalist. Afturat breytini kann so verða knýtt ein grafiskt verkstaður, skulpturverkstaður, keramikkverkstaður, fotoatelier o.s.fr. Hvørt sær krevja hesir verkstaðir rættuliga stórar íløgur, umframt ein verkstaðsleiðara.

Sum ein partur av virkseminum á einum grafiskum verkstaði, kann skúlin møguliga gera eina samstarvsavtalu við Grafiska Verkstaðin í Listaskálanum í Havn.

Myndlistabreytin skal innihalda hesi evni:

- croquistekning (tekning eftir livandi modelli)
- tekning, kompositión
- litlæru, tilfarslæru
- praktiskar royndir innan olju, akryl, akvarell, pastell...
- listasøga
- modellering

Føroyska myndlistasøgan er ung; okkurt um hundrað ár. Málningalistin hevur at kalla verið einaráðandi hesi árini, men nú hómast ávísar broytingar. Tað er tí natúrligt, at myndlistabreytin tekur útgangsstøði í serligu føroysku koloristisku expressionismuni og arbeiðir víðari har frá. Tað er týdningarmikið, at skúlin hevur "fingurin á pulsinum", og at hann er við til at seta ferð á menningina innan listina á Føroyum.

Skúlin verður skipaður við tveimum lestrarhálvum, heyst og vár. Fyrsta lestrahálvu leggur dent á, at næmingurin styrkir grundleggjandi teknikynstur og fær eina greiða hylling á málningurm. Næmingarnir verða undirvístir sum einstaklingar og í bólkum. Teir fáa uppgávur at loysa og ástøðiliga frálæru. Onnur lestrahálva semstur leggur størri dent á at menna tað persónliga úttrýkkið.

Eitt hóskandi frálærumodell er, at undirvísingin fer fram heilar dagar í senn. T.d. ein dag um vikuna croquistekning, tveir dagar málarí o.s.fr. Sum ein partur av undirvísingini síggja næmingarnir tær listaframsýningar, sum eru í landinum og vitja virki listafólk. Eisini ein uttanlandsferð at vitja týðandi søvn er viðkomandi. Skúlaárið kann enda við eini framsýning, har næmingarnir eisini læra at presentera síni verk.

**Samanumtikið**

Myndlistabreytin byggir á ungu føroysku málaratraditiónina, men má vera opin fyri, at listaáhugaður ungdómur anno 2003 førkar seg móti meiri nútímans úttrykki (t.d. installatiónum, performance, land-art, blandaðum tøkni). Tá skúlaárið er av, skal næmingurin hava fingið somikið av royndum, dirvi og innliti, at viðkomandi hættir sær víðari á skapandi leiðini, og samstundis hava ásannað, at eitt myndlistafólk ongantíð gerast liðugt útbúgvið - tað er ein lívslong tilgongd!

## Tónlist

Tónlistabreytin á Listaskúla Føroya er rútmisk tónlistabreyt. Hóast hetta skulu allir næmingar hava fingið innlit í nótalæru og grundleggjandi klaverspæli, tá ið skúlaárið er av, eins væl og førleika fyri improvisatión. Allir næmingar skulu hava verið við í ymiskum samanspælshøpi, tá ið undirvísing er av. Næmingarnir skulu hava fingið ávíst innlit í mong ymisk tónleikasløg (jazz, rock, heimstónlist, spælimanstónleik, kórtónleik, nútímans og klassiskan partiturtónleik o.a.). Samstundis skulu teir hava skapað størri ella smærri "tónleikaverk", tá ið árið er av, antin í bólki ella sum einstaklingar.

Støði verður tikið í hvørjum einstøkum næmingi og serliga áhuga hansara. Eftir førimuni verður roynt at veita næminginum vegleiðing í hansara serliga ljóðføri (ella rødd). Eitt nú í samstarvi við Føroya Musikkskúla, er hetta møguligt.

Dentur verður lagdur á samanspæl, stovnan av tónleikabólki/um, ástøði (har allir næmingar eisini skulu læra eitt sindur av klaverspæli).

Annars verður undirvísingin skipað so, at næmingar fáa ástøðiligt og praktiskt innlit í mong ymisk tónleikasløg. Lærarin, ið hevur ábyrgd av breytini, leggur undirvísingina til rættis við bæði sjálvur at undirvísa í samanspæli, tónleikaástøði o.ø., og er eisini samskipari av vitjanum uttanífrá, t.e. serligum skeiðum við bæði føroyskum og útlendskum gestalærarum. Avtala eigur at fáast í lag millum skúlan og føroysk tónleikarafeløg (Felagið Føroysk Tónaskøld, Havnar Jazzfelag, Føroya Jazzfelag, Føroya Fólkatónleikarafelag o.o.), um at hesi boða skúlanum frá, tá ið tónleikaravitjanir uttanífrá verða fyrireikaðar, soleiðis at næmingarnir á tónlistabreytini hava møguleikan at fáa undirvísing/samanspælsskeið í sambandi við hesar vitjanir.

Eitt skeið (2-5 dagar, ella longri, um áhugi er fyri tí), har greitt verður frá siðbundnum føroyskum tónleiki (kvæðum/kvæðaløgum, vísum/vísuløgum, skjaldrum og kingosangi), er á hvørjum ári.

Skipað verður fyri almennum konsertum á skúlanum, bæði við tónleikarum, ið vitja, og við næmingunum sjálvum.

Kór kann vera á skúlanum, har tað kann standa øllum næmingum í boði at melda seg til. Hetta veldst um undirtøku.

Hvørt skúlaár kann enda við námsferð til eitt av grannalondum okkara, har næmingar fáa høvi at hoyra tónleikaframførslur. Møguliga í sambandi við serligan tónleikafestival.

Annars kunnu smærri útferðir verða gjørdar, eitt nú til Havnar, í sambandi við tónleikaframførslur. Hava næmingarnir so mikið av tilfari, at teir sjálvir bjóða til at fara út um landið at framføra hetta, eigur hetta eisini at verða stuðlað.

**Samanumtikið**

Tónlistabreytin á Listaskúla Føroya eigur fyrst og fremst at eggja hvørjum einstøkum næmingi til at menna síni skapandi evni. Harumframt kann skúlin miðja ímóti at vera ein "grundútbúgving" hjá næmingunum til víðari lesnað innan tónleikin.

Annars verður skotið upp, at allir næmingar á skúlanum - innan allar breytir - arbeiða saman um verkætlanir; t.d. at sjónleikarar seta sjónleik upp, tónleikarar gera tónleik til sjónleikin og spæla (live), meðan framførslan er, mynda-næmingarnir mála/evna kulissur, margmiðlanæmingar gera plakatir og/ella annað og tóvirkisnæmingar gera búnar. Hetta kann vera "kravdur" partur av undirvísingini.

Alt eftir hvussu nógvir næmingar skulu ganga á skúlanum, kundi verið møguligt at allur skúlin fór námsferð ísenn.

## Leiklist

Líka mikið hvør kemur á eitt skeið í sjónleiki kann viðkomandi fáa nógv burturúr, hóast fleiri royndir, ella ongar, og hóast tað í fyrsta umfari kann tykjast at vera "*einki fyri*".

Byrjað verður við grundleggjandi dramavenjingum sum:

- Konsentrationsvenjing
- Improvisatiónsvenjing
- Hugflogspøl og onnur spøl
- Kropsvenjing
- Samarbeiðsvenjing

Hesar grundleggjandi venjingar hava til endamáls at røkka fleiri tingum samstundis. Fyri tað fyrsta at geva næmingunum kensluna av tryggleika við teirra egna hátti at vera uppá, eisini tá tey eru saman við øðrum - í somu støðu. Og samstundis læra at eygleiða onnur, og við lærarans leiðbeining at seta orð á, hvat tað er, tey síggja hini gera, og á tann hátt fáa *eitt felags mál.* Fyri trivnaðin (tað sosiala) hevur tað sjálvandi sín týdning, at tey skilja so tíðliga sum gjørligt, at tolsemi (við sær sjálvum og øðrum) í eini lærutilgongd er sera týdningarmikið.

Hetta eru grundleggjandi venjingar fyri at duga nakrar spælireglur ella arbeiðsreglur, sum skulu brúkast til eitthvørt handverk. Í fyrsta umfari nýtist ikki at fara í holt við ein leik beinanvegin. Út frá hesum ber til hjá viðkomandi lærara at finna útav, hvar støðið er hjá tí einstaka og hjá øllum flokkinum, og harvið eisini hvør tørvurin er.

Hvat krevst víðari fyri antin at røkka eini sýning - er tað at arbeiða praktiskt ella skulu fleiri venjingar til? Hetta skal liggja sum fyrsti partur av skeiðinum, kanska alt fyrsta hálva árið. Aðrar venjingar og aðrir spælistílar eru til dømis:

- Comedia dell'Arte (Maskur)
- Mime (Kropp og "úttrykk")
- Klovn (Stunt og gykl/gandur)
- Klassiskur grikskur leikur (Tosa í kóri, upp á rím)
- Shakespeare o.a. (Á bundnum máli)
- Farce ( Skemt/timing við ferð)
- Hoyrispøl (Spæl og upplestur í mikrofon)
- Film (Myndamál)

Fram ímóti jólum er gott høvi at gera eitthvørt meiri ítøkiligt, til dømis undirhald ella ein jólaleik, við møguligum íblástri úr einum ella fleiri

áðurnevndu spælistílum. Hetta krevur meira av næmingunum, og tí hevði verið best um hetta gjørdist partur av undirvísingini, um tað so bara var eftirmetingin (fyri at nøra og vaksa um medvitið av tí, ið gjørt verður).

Er man komin so langt sum at fara undir ein leik, so verður størri fakligt trýst lagt á hvønn næming. Og kravið um professionellan hugsunarhátt og arbeiðsmoral økist. Fyri at røkka einum lidnum leiki er neyðugt at arbeiða við karakterunum (eyðkennunum) á leiklutunum. Hetta er fyri ein stóran part meiri sjálvstøðugt arbeiði. Tað eru jú ymsir hættir at røkka einum slíkum úrsliti, til dømis at leita leiklutin fram úr kroppinum, t.d. einum gongulagi ella onkrum kropsligum lýti. Hvussu við røddini? Hvørjum klæðum gongur leikluturin í? Uppaftur ein annar møguleiki er: at finna leiklutin bert við at lesa handritið, t.e. leita leiklutin fram úr tekstinum.

Námsferðir í sjónleikarahøpi verða neyvan so nógvar í tali. Tí skal málið verða at síggja allar teir leikir, sum verða spældir í Føroyum, meðan skeiðið er. Eisini kann ferðin til hesar bygdir og býir í hvørjum einstøkum føri tvinnast saman við at vitja á teimum støðum, har sjónleikur hevur verið spældur upp í gjøgnum tíðirnar. Og fáa fólk á staðnum at greiða frá og vísa. Ein uttanlandaferð hevði heilt víst gjørt undurverk. Ynskiligt er at vitja stórar sjónleikarabýir við langari traditión. Fyrst og fremst London. Árið eftir kundi verið vitjað í Moskva, triðja árið New York. Og nú ferðamøguleikarnir eru so nógvir, so kundi man antin á veg úr Føroyum ella á veg heimaftur vitjað í einum av teimum norðurlendsku høvuðsstøðunum.

**Samanumtikið**

Fasti lærarin, sum verður knýttur at leiklistaflokkinum, skal taka samanum og gera niðurstøður hvørja ferð ein gestalærari er liðugur við sítt skeið. Bæði sjálvur, men mest týdningarmikið, at tað verður gjørt saman við næmingunum - kanska hvørjum næmingi sær - tað má ikki henda at næmingurin hevur fingið eina vitan, sum hann ikki fær brúkt, tí hann ikki skilir hvussu, hví og hvat hetta var. Næmingurin skal hava eina frágreiðing. Hetta eisini fyri at koma øllum illgitingum til lívs beinanvegin. Eisini skal fasti lærarin taka samanum hvørja ferð, ein verkætlan er at enda komin. Umráðandi er at geva næmingunum eitt arbeiðslag, sum skal brúkast í øllum teir gera restina av lívinum - helst. Tí tað er ein góður og royndur lutur, at torir man at seta orð á t.d. kenslur og tankar, og á tann hátt geva teimum lív, so veit man eisini hvørja megi hesi orð, kenslur og tankar hava - og niðurstøðan er: Tú ert vorðin erligari, sterkari, klókari. Tú ert broyttur, tú ert vaksin.

**Sjónleikur er ein spegil, ið verður hildin upp, so samfelagið fær speglað sær**

## Tóvirki - eksperimenterandi tekstillist

Næmingurin skal eftir lokna skúlagongd kunna arbeiða seg ígjøgnum tilgongdina, frá hugskoti til lidna vøru. Hann fær eitt hugskot, ið hann skal kunna skitsera niður á pappír, taka støðu til stílart, teknikk, val av tilfari, val av litum, form, struktur, mynsturkonstruktiónir, sniðútviklan og til endans at framleiða vøruna. Kjarnin er, at hugskotið hjá næminginum er nýhugsan.

Undirvísingin kann býtast upp í tríggjar partar: handverk, skapandi og ástøði.

Handverk:
- Skinnarbeiði
- Tøving
- Binding
- Veving
- Seyming
- Tilskering

Næmingurin skal læra grundarlagið innan tey ymisku handverkini. Síðani skal hann gera eina lítla verkætlan fyri hvørt handverk. Hesar verkætlanir skulu vera "non funktionellar". Grundin fyri hesum er, at tá tú arbeiðir við tekstili, hugsar tú sum oftast funktionelt og hetta kann forða kreativitetinum.

Skapandi (design):
- Modelskitsering
- Tilfarslæra
- Stíl, form og litalæra
- Mynsturkonstruktión
- Sniðútvikling

Tá vit eru komin til hendan partin av undirvísingini, skulu næmingarnir vera loystir úr tí traditionella hugsunarháttinum. Modelskitsering er ein týðandi partur av design tilgongdini, so tað skulu vera nógvir tímar í tekning. Í tilfarslæru skal vera undirvíst í traditionellum og ótraditionellum tilfari, tey skulu læra um hvaðani tilfarið stavar, hvussu tað verður framleitt og hvussu tað skal viðgerast. Her eru nógvir ideologiskir spurningar uppi í; t.d. umhvørvið o.a. Í stíl-, form- og litalæru, skulu tey læra um tær ymisku stílartirnar, her skulu tey útvikla sín formsans og læra ta traditionellu litalæruna saman við teimum ymsu filusofisku og psykulogisku litalærunum. Í mynsturkonsstruktión og sniðutviklan skulu næmingarnir læra at skapa síni egnu mynstur.

Ástøði:
Allar greinirnar veksla millum ástøði og praksis, tó er høvuðsdenturin lagdur á praksis. Søguligar, filosofiskar og samfelagsligar lýsingar av tekstilinum og mótanum.

Grundin til, at vit hava valt skinn, tøving, veving og binding er, at vit her kunnu nýta egna ráevnið "seyðin". Design, tilskering, og seyming eru náttúrligar greinar, ið ein má tilogna sær, so ongar forðingar eru í tí eksperimenterandi tilgongdini.

Skinnarbeiði kann gerast ein trupulleiki, men ikki størri enn, at hann kann loysast. Eins og aðrastaðni kunnu vit ikki fara út og keypa skinn og roð, tí okkara skinn verða brend upp í tonsatali. Skinnarbeiðið kundi verið býtt í tvær greinar, garving og formgeving av skinni og roði. Møguliga kundi hetta stig verið við til at loyst skinntrupulleikan.

Undirvísingin er í tveimum pørtum. Í tí fyrra tilognar næmingurin sær handverksligan, skapandi og ástøðiligan førleika innan allar lærugreinar. Í tí seinna partinum, skal næmingurin menna síni skapandi evnir. Tað skal liggja fast, at seinni parturin verður eksperimenterandi burturav. Út frá hesum innihaldinum skal næmingurin ogna sær kunnleika og førleika at arbeiða seg ígjøgnum tilgongdina, frá hugskoti til lidna vøru.

Í tovirki er neyðugt at fara uttanlands á námsferð. Tað kundi verið t.d. Danmarks designerskole, Skolen for brugskunst o.s.fr. Sjálvandi skulu vit eisini hyggja eftir, hvat er áhugavert í hinum grannalondunum. Tað eru heldur ongar forðingar fyri, at allur listaskúlin einaferð um árið fer ein túr til ein stórbý.

**Samanumtikið**
Føroyar er nokk tað landið í tí framkomna heiminum, har størstiparturin av konufólkinum dugir handaligt arbeiði til húsbrúk, eins og eitt hav av slíkum tilboðum eru frammanundan, tí krevst tað, at hendan breytin hevur nakað annað at bjóða. Tí má tann skapandi parturin hava ein stóran leiklut. Fyri at hetta skal eydnast er tað altavgerandi, at tað eru tey røttu fólkini, ið undirvísa. Neyðugt er ikki, at útgreina hvørja grein. Heldur skal ein greið endamálsorðing gerast, so hvør lærari sær, ger eina ætlan, ið skal leggjast fram fyri leiðsluna til góðkenningar. Á hendan hátt er lærarin ikki bundin at einari fastari ætlan, men verður eggjaður til at vera framskygdur. Samstundis fær hann eina ávísa ábyrgd, og er tað í sær sjálvun ein persónlig menning fyri læraran.

## Margmiðlalist

Undirvíst verður bæði í margmiðlalist og í grafiskari sniðgeving. Fyri margmiðlalist er galdandi, at næmingurin eftir lokið skúlauppihald skal kenna til tey ymsu margmiðlaøkini. Innan grafiska sniðgeving skal næmingurin kenna til grafiska sniðgeving. Fyri bæði fakøkini er galdandi, at næmingurin skal hava fingið ástøðiga kunning á økinum og hava roynt øll fakøkini í praksis. Harumframt skal næmingurin fáa íblástur til at vera søkjandi og eggjast til at søkja vitan um, hvat rørist og mennist á økinum.

Skeiðslýsingar skulu skrivast fyri fakøkið. Út frá hesi skeiðslýsing mugu undirvísarar og næmingar arbeiða miðvíst fyri at røkka dygdarsetningin, heldur enn at tráa eftir nøgdaruppfylling.

Næmingar skulu heilt greitt fáa at vita dygdarstøðið, tá teir lesa upplýsandi tilfar um skúlan í samband við upptøkusamrøðuna, og tá byrjað verður. Hetta fyri at signalera høga støðið á skúlanum og í undirvísingini.

Innan margmiðlalist verður undirvíst í litalæru, skanning, myndaviðgerð, uppseting, heimasíðusmíð og fløguframleiðslu. Undirvísingin er bæði ástøðilig og praktisk við serligum ásettum málum, t.d. at gera upplýsandi tilfar, um næmingin sjálvan ella skúlan, ferðavinnutilfar, eitt nú um Sandoynna (og so hinar oyggjarnar næstu árini), um almenn evnir so sum mentan, list, politikk, umhvørvi, fiskivinnu, føroyskan dans, ítrótt, økismenning o.s.fr.

Innan grafiska sniðgeving verður undirvíst í sniðgeving, litalæru, skriftlæru og sniðgeving, fríhondstekning og kompositión. Undirvísingin verður bæði ástøðilig og praktisk við serligum ásettum máli fyri eyga, t.d. at sniðgeva egið búmerki og stíl sum heild, sniðgeva búmerki og stíl við atliti at teimum uppgávum, sum skulu gerast á margmiðlalistabreytini.

Fyri nøkrum av lærugreinum er møguligt at hava tvørfakliga undirvísing saman við næmingum á myndlistabreytini og tóvirkisbreytini. Í samband við nevndu fakøkir og uppgávur, fara næmingarnir at vitja virkir sum kann stimbra tey og roynt eigur at verða at fáa í lag samstarv, soleiðis at næmingarnir kunnu loysa uppgávur fyri virkir, soleiðis at tey hava beinleiðis eftirmeting av teirra royndum.

**Samanumtikið**

Tá alt hetta um karmar, skeiðslýsingar v.m. er sagt, má eisini verða havt í huga, at skúlin og undirvísari avgjørt skulu geva rúm fyri, at hvør næmingur næstan "kann *sprella* sum honum lystir" - undir ábyrgd sjálvandi.

Rúm eigur eisini at vera fyri, at næmingar sjálvir kunna undirvísa, har tað er skilagott, og har førleiki er til staðar.

Og ikki minst: Strembast má ímóti, at hvør næmingur merkir, at hann fær serundirvísing og verður fluttur á hægri støði og verður persónliga mentur.

## Listasøga

Á listaskúlanum eigur at vera undirvíst í listasøgu. Hetta eigur at vera ein felagsgrein, sum allir næmingarnir luttaka í.

Í listasøgu verður tað tikið fram, sum umfatar tey snið v.m., sum hava verið frammi og hava ment og broytt seg ígjøgnum tíðirnar. Næmingarnir fáa innlit í søguligu menningina innan málningalistina, skulptur, arkitektur og listahandverk frá fornøldini til okkara tíð í Evropu, og í nýggjari tíð eisini í USA. Eisini læra næmingarnir um føroyska listasøgu.

Undirvísingin fer at leggja seg eftir at læra næmingarnar at fordjúpa seg í listini, læra teir at greina myndir og aðra list, læra um samfelagslig sereyðkenni hjá listini og sambandið millum tað estetiska og tað søguliga í listini.

Listasøga er hóskandi at hava 2-4 tímar um vikuna og kundi henda lærugrein endað við eini skriftligari uppgávu.

## Niðurstøður

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt út frá teirri ætlan, at undirvíst verður í fimm listabreytum á listaskúlanum. Tað, sum hesar listabreytir hava til felags, er, at undirvísing bæði fevnir um ástøðiliga og praktiska frálæru. Dentur verður tó lagdur á tað skapandi og eksperiementerandi.

Støði verður tikið í tí, sum sermerkir okkara egnu mentan, men samstundis er neyðugt at fáa inspiratión frá tí, sum hendir innan skapandi list á altjóða pallinum. Tí er neyðugt, at næmingarnir fara á námsferð fyri at uppliva tað, sum hendir í altjóða listaverðini. Gott hevði verið um allur skúlin fer saman á námsferð, har næmingarnir saman kunnu uppliva tað, sum er felags, samstundis sum teir kunna seg um tað, sum er sermerkt innan teirra listagrein.

Samstarv og tvørfaklig undirvísing eigur at verða í miðdeplinum, uttan at tað gongur út yvir fordjúpingina innan egnu listagrein. Tvørfaklig undirvísing er eyðsæð t.d. á breytunum innan myndlist/margmiðlalist/-tóvirki innan litlæru, samstundis sum allar breytir kunnu samstarva um ymsar verkætlanir, framførslur og leikir. Samstundis er undirvísingin í listasøgu felags fyri allar næmingar á skúlanum.

Felags fyri allar breytirnar er, at tað er ein fyritreyt, at dygdin er í hásæti. Heldur enn at hava eitt breitt tilboð, eigur at undirvísast í útvaldum lærugreinum innan einstøku breytirnar.

# Kapittul 3 - Fyritreytir og karmar

*Í hesum kapitlinum verða førleikakrøvini til lærararnar á teimum ymsu breytunum viðgjørd. Læraraorkan er saman við umstøðunum tað týdningarmesta, um skúlin skal fáa eitt gott umdømi og næmingarnir mennast og trívast. Ymiskt er hvussu nógvir næmingar hvør breyt kann hava, tí verður næmingatalið eisini viðgjørt her. Tær fysisku umstøðurnar eru eisini av stórum týdningi, bæði hvat undirvísingarumstøðurnar viðvíkja, eins væl og bústaðarviðurskiftini.*

## Førleikakrøv – undirvísarar

Skapandi listafólk eiga at undirvísa í teimum skapandi fakunum - ongantíð betur eru teir góðir pedagogar eisini. Møguliga eigur at setast sum treyt, at tey hava tikið skeið í pedagogikum. Til tann handverksliga partin er brúk fyri faklærarum, t.e. lærararum, ið hava prógv innan fakið í tann mun tað er møguligt. Innan eitt nú tóvirki er neyðugt, at lærarin, ið undirvísir innan tey skapandi fakini, er klædna- og tekstildesignari.

Dygdin má vera í hásæti, og tí mugu bestu lærarar í landinum "fáast til vega". Umframt skúlaleiðaran eru lærararnir teir, ið fara at mynda listaskúlan úteftir. Lærarnir fara at hava altavgerandi týdning fyri innihaldið og avkastið av skeiðunum, tí er tað av sera stórum týdningi at røttu persónarnar verða settir í starv. Skipað eigur at verða soleiðis fyri, at listafólkini, sum skulu undirvísa, fáa góðar sømdir, løn og arbeiðsviðurskifti - so tey støðast á skúlanum, tí tey koma at mynda innihaldið.

Tað er neyðugt hjá hesum listafólki framhaldandi at vera í skapandi tilgongdini, og tí eigur undirvísingin á skúlanum at verða skipað soleiðis, at undirvísingin nervar skapandi virksemið hjá listafólkunum minst møguligt. Hetta kann t.d. fremjast við, at tað ikki verður undirvíst eftir afturvendandi tímatalvum, men heldur í evnum, t.d. 1-2 dagar ella eina viku í senn.

Lærarin skal hava góðan kunnleika til undirvísing, og duga at síggja, hvat tí einstaka næminginum tørvar - til eina og hvørja tíð. Tí um hesin lærarin hevur tey góðu pedagogisku evnini vit eftirlýsa, so kann hesin lærarin "lofta" og "leiða" næminginum gjøgnum alla skúlagongdina, sjálvt um onkur av gestalærarunum eru minni stinnir pedagogiskt.

Tað er av týdningi at listaskúlin samstarvar við aðrar líknandi skúlar uttan fyri landaoddarnar viðvíkjandi gestalærararum.

## Næmingatal

Við støði í uppskotinum um, at tað verða fimm listabreytir, verður mælt til, at min. 6 og max. 16 næmingar vera á hvørjari listabreyt. Ójavnt er innan hvørja breyt, hvat best hóskandi talið er, men í miðal verður mett, at eitt hóskandi næmingatal á hvørjari breyt er 8. Pláss eigur tí at verða fyri umleið 40 næmingum á listaskúlanum. Tað er av týdningi at tað er nøkurlunda javnvág ímillum næmingatalið á hvørjari breyt, soleiðis at eingin breyt er munandi størri enn aðrar.

Um støðið á undirvísingini skal verða høgt má hugsast um, at næmingagrundarlagið er lítið í Føroyum. Hetta at skilja soleiðis, at vit eru fá, og til ber ikki at fylla stórar flokkar við næmingum um sama aldur, sum hava listarligar gávur, serligar førleikar og brennandi áhuga fyri einari listagrein á hvørjum ári. Arbeiðsbólkurin metir, at skal endamálið við skúlanum røkkast, skal dygdin verða í hásæti, og tá verður næmingatalið ikki stórt.

T.d. verður mett at í mesta lagi 6 næmingar vera um árið á eini myndlistabreyt.

Innan tónlist verður mett at millum 8-12 næmingar er hóskandi støðd, tí hædd skal takast fyri, at næmingarnir skulu fáa nakað burturúr.

Innan leiklist er tað av týdningi, at flokkurin ikki er ov stórur. Rættast er, um bert 6 næmingar eru í flokkinum. Tríggir av hvørjum kyni. Men eisini kundu gingið 8, fýra gentur og fýra dreingir, men kemur næmingatalið uppá 10, og kanska 12, so missir undirvísingin ov nógv í virði. So hvørt sum næmingatalið hækkar verður eisini verri at fáa næmingar inn árið eftir. Harafturat skulu næmingarnir, sum velja hesa grein, duga væl føroyskt, bæði at lesa og skriva - tí á hesi grein verður málið fyrst sum síðst: føroyskt - og síðan altjóða (volapykk, mime o.s.fr.).

Innan tóvirki eru ongar forðingar viðvíkjandi støðd av flokki. Er pláss nokk til 30 næmingum, kunnu fleiri linjur koyra í senn. Men við atliti at, at javnvág skal verða ímillum breytirnar, verður mælt til, at næmingatalið innan hesa breyt verður millum 8-12 næmingar.

Á margmiðlalistbreytini er torført at undirvísa um flokkarnir gerast ov stórir, so eisini her verður mælt til at næmingatalið verður umleið 12 næmingar.

# Hølistørvur - undirvísingin

**Myndlist**
Ein myndlistabreyt krevur fyrst og fremt eitt rúmligt atelier við góðum natúrligum ljósi. Herumframt skal hvør næmingur hava sítt staffeli, borð o.s.fr. Alt eftir hvørjum greinum valt verður at undirvísa í innan myndlistabreytina, eiga amboð at verða tøk til endamálið.

Sum nevnt krevja verkstøðini innan myndlistaøki, t.e. keramikk, grafikk og fotoatelier, kostnaðarmikil amboð og tól, umframt ein verkstaðsleiðara. Støða eigur tí at verða tikin til, hvat fíggjarligu karmarnir loyva, og innihaldið í breytini má lagast til hetta. Heldur enn at slakað verður við dygdini í amboðunum, eigur talið av fakum at avmarkast.

**Tónlist**
Fyrst av øllum er neyðugt við tveimum samanspælsstovum við klaveri og trummusetti í báðum (ella aðrari). Fleiri ljómborð (elektrisk klaver/keyboard) við oyramikrofonum mugu vera til taks, eitt sanganlegg og fløguspælari við góðum hátalarum er neyðugt. Møguliga eisini onnur ljóðføri, soleiðis sum lærarin heldur vera ráðiligt.

Harafturat kundi tað verið upplagt at havt eitt lítið ljóðstudio. Møguliga ein telda við cubase ella øðrum forriti, við møguleika at taka upp ella ein harddiskupptakari, ið er lættur at ferðast við. Slík útgerð, við nøkrum mikrofonum, kostar okkurt um 50.000 kr. ella meira. Varð rætt atborið í byggingini av hesum høli (við upptøkurúmi og teknikkararúmi), hevði hetta nærum verið á professionellum støði, hóast tað ikki er tað mest umráðandi. Hetta skal meira vera fyri at fáa hylling á fleirspors-upptøkum og fáa roynt hugskot í verki, gjørt ljóðkollagur o.a. Slík upptøkuhøli eru oftast knýtt at skúlum sum hesum.

Tað hevði einki bilað, um studio'ið hevði verið so mikið gott, at tað kundi verið brúkt til upptøkur við útgávum ella demo-fløgum fyri eyga. Val av ljóðførum og tøkni má gerast í samráð við fólk, ið hava skil fyri hesum. Bæði samanspælsstovur og upptøkuhøli mugu vera ljóðisoleraði, soleiðis at arbeiðast kann uttan at neyðugt er at taka hædd fyri øðrum fólki í húsinum og tíð á degi. Tað besta hevði verið - og hetta er mátin tey brúka í fleri háskúlum í Danmark - at hesi høli kundu verið síni egnu lítlu hús (møguliga tríggjar smáttur/iglooir), nakrar metrar burturfrá restini. So kann larmast dag og nátt um tað skal vera, og tað hevur týdning.

**Leiklist**

At gera og spæla ein sjónleik nýtist ikki at krevja tað stóra, hvørki av tilfari ella nøkrum øðrum tekniskum finessum.

Hugsa vit okkum, at næmingurin skal læra sjónleikarakynstrið frá botni av, so verður tað til eina og hvørja tíð førleikin hjá sjónleikaranæminginum, sum stendur eftir.

Men til sjónleik nú á døgum verður kravt ljóð, ljós og hvørt av sínum, og skal hetta vera ein skúli, sum eisini skal læra næmingarnar at brúka nutímans hentleikar, mugu hesir hentleikar sjálvandi vera til staðar.

Eitt høli, sum skal brúkast til sjónleik krevur sjálvandi sítt. Men fyrst og fremst er ynskiligt at hava eitt rúm, sum í minsta lagi er 10 x 20 m. til støddar. Hetta skal vera sum ein lítil fimleikahøll, men brúkast til mangt annað.

Uppi undir loftinum skal gerast upphang til ljós. Rør-skipan, sum ger tað møguligt at hanga projektørarnar alla møguliga staðni. Síðani má ein ljóspultur vera, so man fær stýrt ljósinum, hann skal kunna flytast og ikki vera stationerur. Tað sama við einum ljóðpulti, sum kann taka bæði disklar, fløgur, bond o.s.fr.

Umframt hetta hevði verið ynskiligt at annar endin á rúminum kundi latast upp, so møguleiki var at gera ein pall, sum vit kenna tað frá vanligum sjónleikarahúsum. Her kann loftið vera væl hægri, so pláss verður fyri at kulissurnar verða togaðar upp.

Harafturat skulu so vera sminkurúm og brúsurúm og wc og so ikki at forgloyma eitt stórt og gott goymslurúm. Hesi rúm mugu liggja soleiðis, at tey ikki órógva, hóast tey verða brúkt, meðan ein leikur verður framførdur.

Sjálvt sjónleikarahúsið skal vera væl ljóð-isolerað. Og tí krevst ein góð ventilatión. Harafturat mugu hurðar og onnur op gerast ordiligt, her kann vera vert at leggja afturat, at inni í einum sjónleikarasali eru eingi vindeygu.

Eitt verkstað at smíða og mála veggir o.s.fr. skal eisini vera. Hetta kann t.d. samstundis vera verkstaðurin hjá húsavørðinum.

**Tóvirki**
Neyðugt er at hava ein verkstað til allar greinirnar innan tóvirki, tí tað fer at gera umhvørvið meira livandi og inspirerandi. Harumframt skal ein undirvísingarstova vera við síðuna av verkstaðnum.

Verkstaðurin má verða rúmligur við góðum dagljósi. Verkstaðurin skal kunna rúma vevar, eitt stórt arbeiðsborð til hvønn næming og nakað av fríum gólvplássi. Bindimaskinur, seymimaskinur, arbeiðsstólar, ginur, spegl, verktoysborð, o.a. Eisini skal ein undirvísingarstova vera við síðuna av verkstaðnum, umframt at tað er neyðugt við einum væl inrættaðum vaskirúmi, einum hjalli og einum goymslurúmi.

**Margmiðlalist**
Neyðugt er at hava eina teldustovu, sum hevur hesi amboð til næmingar og undirvísara:
- Eina teldu til hvønn næming
- Ein felags scannara
- Eitt felags digitalt fótotól
- A4 svart/hvítur printari, sum er felags fyri alt undirvísingarvirksemið á skúlanum
- A3 litprintari til eitt nú plakatir v.m. í samband við framsýningar, tiltøk o.a.
- Uppvørpu
- Sjónvørpu, sum stendur í samband við lærarateldu og kann nýtast til mangt annað
- Neyðug telduforrit (hesi fáast bíligari til skúlar - fleirbrúkara "Educational use only")

## Hølistørvur - umsiting

Neyðugt er við skrivstovuhølum til skúlaleiðaran og umsitingarleiðaran. Harumframt eigur hvør lærari at hava eina skrivstovu, t.e. fimm skrivstovur, ella at ein felagsskrivstova við 2-3 arbeiðsplássum verður gjørd, sum lærararnir skiftast um at nýta.

## Hølistørvur - køk/kantina/uppihaldsrúm

Listaskúlin verður ein vistarskúli, og er tí neyðugt at køk og kantinuumstøðurnar eru hóskandi. Harumframt eiga næmingarnir at hava eitt uppihaldsrúm, sum m.a. hevur sjónvarp, video og teldur. Hetta kann møguliga samskipast við kantinuna.

## Hølistørvur - bústaður hjá næmingunum

Arbeiðsbólkurin mælir sum sagt til, at undirvísingin á listaskúlanum fevnir um eitt 1 ára skeið. Tá talan er um so langa tíð, heldur arbeiðsbólkurin, at tað er neyðugt at næmingarnir fáa egið kamar. Hetta kann t.d. gerast soleiðis:




## Hølistørvur - bústaður hjá lærarum

Sum áður nevnt, verður mett, at tað hevði verið gott um 3-4 lærarar búðu á skúlanum ella nærhendis skúlanum. Skúlaleiðarin skal í hvussu so er búgva á skúlanum, og tí er neyðugt við einari størri íbúð ella einum sethúsið, tí væntast kann, at skúlaleiðarin hevur familju. Hetta skal liggja á skúlanum, men tó verða avsíðis soleiðis, at skúlaleiðarin og familja hansara kunnu hava eitt privatlív.

Tað sama er galdandi fyri hinar lærararnar, ein íbúð ella sethús, sum teir saman við familju sínari kunnu búgva í. Tá ætlanin er, at lærararnir verða skapandi listafólk, kann hugsast, at tað í bústaðnum verður rúm fyri arbeiðshøli, soleiðis at teir kunnu halda áfram við sínum skapandi virksemi.

## Niðurstøður

Lærarnir fara saman við skúlaleiðaranum at mynda innihaldið í undirvísingini, samstundis sum teir fara at geva skúlanum sítt umdømi, og tí er tað av allar størsta týdningi, at røttu fólkini verða sett í starv á skúlanum. Skulu bestu fólkini fáast til vega, er neyðugt, at umstøðurnar eru góðar. Hetta er bæði hvat viðvíkur løn og bústaðarmøguleikum, og umstøðurnar fyri at skapa bestu frálæru.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at tað verða skapandi listafólk sum fara at undirvísa á skúlanum, umframt at tað, har tað krevst, eru fakfólk, sum undirvísa.

Dentur verður samstundis lagdur á, at næmingatalið er hóskandi, bæði í mun til at fáa best burturúr frálæruni til hvønn einstaka næming, og at javnvág er í støddini á teimum fimm flokkunum. Arbeiðsbólkurin heldur, at eitt tal ímillum 6-12 næmingar á hvørjari breyt er hóskandi, og verður mælt til, at skúlin kann hýsa umleið 40 næmingum.

Harumframt hevur arbeiðsbólkurin lýst hølistørvin, bæði tá tað kemur til undirvísing, bústað hjá næmingum og læraraum, umsiting og uppihald hjá teimum sum búgva á skúlanum. Arbeiðsbólkurin hevur eisini lýst hvørji amboð eru neyðug innan hvørja listabreyt.